LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 108/2023 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Jørgen Niclasen, løgtingsmanni, um pengar úr landskassanum í statskassan**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Ætlar landsstýrið at taka upp samráðingar við donsku stjórnina um, at bøtur í Føroyum skulu í landskassan, heldur enn statskassan?
2. Um so er, hvørjar bøtur vil landsstýrið royna at tryggja landskassanum?

**Svar:**

**Til spurning 1**
Eg eri samdur við spyrjaranum í, at tá talan er um bøtur á yvirtiknum málsøkjum, so eiga hesar sjálvsagt at fella til landskassan. Tí tók eg longu málið upp við danska forsætisráðharran, á fundi í Keypmannahavn, tann 2. oktober í fjør, har eg kom við eini áheitan um, at samráðingar verða tiknar upp um eitt øðrvísi býti av sektum millum ríkiskassan og landskassan. Á fundinum varð avtalað, at Løgmálaráðið og danska Justitsministeriet skuldu umrøða hesi viðurskifti nærri. Málið hevur drigið nakað út, tí at man frá danskari síðu ikki var greiður um, hvørt tað var Justitsministeriet ella Finansministeriet, ið varaði av málinum. Hesi ivamál eru nú avgreidd, og Løgmálaráðið hevur upplýst, at samráðingarnar verða væntandi tiknar upp við Justitsministeriet í næstum.

**Til spurning 2**
Sum spyrjarin ger vart við í viðmerkingunum til fyrispurningin, verða útreiðslurnar fyri eftirlit á yvirtiknum málsøkjum hildnar av landskassanum. Tað eru sostatt føroyskir myndugleikar, sum kanna og fyrireika hesi málini. Tí haldi eg at tað er sjálvsagt, at vit finna eitt framtíðar býti, har sektir fyri brot á lóggávu á yvirtiknum málsøkjum fella til landskassan, meðan sektir fyri brot á lóggávu á felags málsøkjum fella til ríkiskassan.

Í Tinganesi, 4. apríl 2024

Aksel V. Johannesen
løgmaður

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo